FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

# Upprit um búskaparligu avleiðingarnar av COVID-19

**Høvuðsniðurstøður:**

- Óvissan er serstakliga stór í løtuni. Neyðugt er at hava atlit at hesum
- Afturgongd verður sannlíkt í búskapinum í 2020 og møguliga eisini í 2021
- Búskapurin kann minka 3-10% í 2020, møguliga heldur minni í 2021
- Landskassin kann lættliga fáa hall á 800 mió. kr. og upp til 1,5 mia. kr. í 2020, og nakað minni í 2021
- Landið, samfelagið, kommunur, almennir grunnar, stórur partur av húsarhaldunum og stórur partur av vinnulívinum eru væl fyri at standa ímóti einum tíðarskeiði við afturgongd í búskapinum

**Orsøk til at málið verður tikið upp**

Fyri Løgtingið, landsstýrið og kommunurnar er týðandi at kunna meta um búskaparvøksturin næstu árini og um inntøkuvøksturin í samfelagnum sum heild. Hetta hevur millum annað týdning í sambandi við fíggjarlógina hjá landinum og í sambandi við fíggjarætlanir hjá kommununum.

**Inngangur og bakgrund**

Búskaparliga virksemið í Føroyum og aðrastaðni er minkað munandi orsakað av virussmittuni COVID-19 og av tiltøkunum, sum eru sett í verk fyri at seinka spjaðingini av sjúkuni.

Tiltøkini hava verið grundað á heilsufaklig atlit. Endamálið við teimum hevur verið at tryggjað, at heilsuverkið ikki verður ovbyrjað, tí ov nógv vera smittað samstundis, og at heilsuverkið tí ikki fær viðgjørt allar sjúklingarnir nóg væl. Fyri samfelagið hevur tað stóran týdning, at heilsuverkið ikki verður ovbyrjað av nógvum sjúklingum, sum vera smittaðir og sjúkir samstundis. Týdningurin av hesum sæst millum annað í Norðuritalia.

Samstundis er greitt, at tiltøkini, sum eru sett í verk fyri at seinka spjaðingini av smittuni, eisini eru sera kostnaðarmikil fyri samfelagið, landið, borgarar og vinnulívið. Stórir partar av búskapinum eru afturlatnir í løtuni, og inntøkuskapanin er minkað munandi í samfelagnum.

Mest sannlíkt verður talan um eina støðu, sum ikki er varandi. Tá til ber at lata búskapin uppaftur, fer inntøkuskapanin í samfelagnum at halda fram eins og áður. Verður talan um eitt longri tíðarskeið við broyttari atferð hjá borgarum og fyritøkum, er kortini vandi fyri, at arbeiðsloysið kann hækka nógv og at fólkafráflyting aftur kann taka seg upp, til dømis um afturgongdin verður størri í Føroyum enn í okkara grannalondum. Hetta kann merkja, at vøksturin í búskapinum, sum frálíður, verður minni, og at vøksturin ikki kemur uppaftur á støðið, sum var áðrenn kreppuna.

Í uppritinum verður stutt roynt at lýsa, hvussu COVID-19 og tiltøkini kunnu hugsast at ávirka búskapin næstu árini.

**Stutt um útgangsstøðið**
Fíggjarmálaráðið metir, at útgangsstøðið fyri føroyska búskapin er gott. Fíggjarmálaráðið metir, at búskapurin er væl fyri at kunna standa ímóti og handfara eitt tíðarskeið við búskaparligari afturgongd orsakað av COVID-19. Fíggjarmálaráðið metir, at góða útgangsstøðið gevur myndugleikum góðar møguleikar at handfara búskaparligu avleiðingarnar av einari afturgongd, sum helst verður í 2020 og møguliga eisini í 2021.

Búskapurin hevur verið í hákonjunkturi í fleiri ár, áðrenn støðan við COVID-19 tók seg upp. Fólkatilflyting hevur verið til landið síðani 2014, arbeiðsloysið er metlágt, og løntakaratalið er methøgt. Almenna skuldin er ikki høg, samfelagið hevur stóra nettoogn mótvegis útlondum, og flestu føroysk húsarhald og stórur partur av vinnulívinum eru sum heild fíggjarliga væl fyri og hava í miðal ikki høga skuld.

Fíggjarmálaráðið metir tí samanumtikið, at landið hevur fíggjarligt rásarúm til at standa ímóti einari afturgongd í búskapinum og at seta fíggjarpolitisk tiltøk í verk fyri at forða fyri, at afturgongdin verður drúgv, sum kann hava við sær stórt arbeiðsloysi og at fólkafráflyting tekur seg upp.

**Um búskaparligu avleiðingarnar av COVID-19**
Virussmittan COVID-19 og tiltøkini fyri at seinka spjaðingini av smittuni hava í stuttum við sær, at borgarar og fyritøkur hava broytt atferð, og at bæði útboð og eftirspurningur eru minkað.

Matstovur og líknandi, handilsvinnan, upplivingarvinnan, flog-, flutnings- og ferðavinnan o.o. tænastuvinna eru ávirkað av, at samfelagið er farið niður í ferð. Fyritøkur í øðrum vinnum eru ávirkaðar óbeinleiðis. Tað kann vera fyritøkur, sum framleiða vørur og tænastur til vinnur, sum eru beinleiðis ávirkaðar.

Útflutningsvinnur vera eisini ávirkaðar av støðuni. Til dømis kunnu vera avbjóðingar at útflyta saltfisk til marknaðirnar í Suðurevropa í løtuni. Vøruflutningur serliga við flogførum er eisini ávirkaður. Roknast kann eisini við príslækkingum og minni keypsorku á marknaðum, sum vit hava útflutt nógv til síðstu árini. Fíggjarmálaráðið roknar nú við, at útflutningurin fer at minka í 2020 sammett við 2019 roknað í virði. Áðrenn støðan við COVID-19 tók seg upp, roknaði Fíggjarmálaráðið annars við, at útflutningurin fór at vaksa í ár.

Arbeiðsútboðið er eisini minkað í summum vinnum, tí fólk eru í sóttarhaldi og mugu arbeiða í minni toymum, og vøggustovur, barnagarðar og skúlar hava verið afturlatin. Samanumtikið hevur alt hetta við sær lægri inntøkuskapan og produktivitet í landinum.

Eftirspurningurin er eisini ávirkaður. Fólk verða eggjað til at vera heima við hús sum mest. Hetta minkar í sjálvum sær eftirspurningin. Fólk hava eisini broytt teirra atferð fyri at seinka spjaðingina av smittuni og fyri at minka um vandan fyri sjálv at fáa smittuna. Óvissan kann eisini fáa brúkarar til at útseta at keypa ymiskar vørur.

Ein stór minking í eftirspurninginum og óvissa um næstu 1-2 árini kann fáa fyritøkur at útseta íløgur og útbyggingar av teirra framleiðsluorku.

Fíggjarmálaráðið ger vart við í sambandi við metingar av búskaparvøkstri í 2020 og 2021, at óvissan um metingarnar er serstakliga stór, og metingarnar skulu skiljast við hesum í huga.

Fíggjarmálaráðið roknar fyribils við, at búskapurin kann minka 3-10% í føstum prísum í 2020 orsakað av støðuni við COVID-19. Ber til at lata búskapin uppaftur eftir stuttari tíð og um gongd eisini kemur í heimsbúskapin eftir stuttari tíð, kann afturgongdin gerast um 3-5%. Verður hinvegin

talan um eitt longri tíðarskeið á fleiri mánaðir ella longri, og um ein stór og drúgv afturgongd verður í heimsbúskapinum, kann búskapurin minka í minsta lagi um 10%.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum samsvara við metingar hjá danska tjóðbankanum og OECD. Danski tjóðbankin roknar til dømis við, at danski búskapurin minkar 3-10% í 2020 og at stígur helst verður í búskapinum í 2021, áðrenn búskapargongdin verður meira vanlig aftur. OECD metir, at búskapirnir minka um 2% fyri hvønn mánað, sum hørð tiltøk eru sett í verk fyri at seinka spjaðingini av COVID-19.

Í útgangsstøðu eru ongar orsøkir at halda, at ein lítil og opin búskapur sum tann føroyski verður minni ávirkaður av støðuni við COVID-19 sammett við størri lond til dømis í Evropa. Vit útflyta matvørur til Evropa, USA, Russland, Kina og onnur lond. Minkar keypsorkan á hesum marknaðunum orsakað av einari búskaparkreppu, fer hetta eisini at ávirka virðið á føroyska útflutninginum, og príslækkingar kunnu koma fyri.

**Um avleiðingarnar fyri landskassan**
Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við í sambandi við metingar av úrslitinum hjá landskassanum í 2020 og 2021, at óvissan um hesar metingarnar eisini er serstakliga stór, og at metingarnar skulu skiljast við hesum í huga.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin kann fáa hall á um 800 mió. kr. í 2020 og møguliga nakað minni í 2021. Største orsøkin er, at inntøkurnar vera munandi minni sammett við, tá ið fíggjarlógin fyri 2020 varð gjørd. Vanligi landsskatturin verður helst lægri.

Minni innflutningur, minni umsetningur og ógvusliga lækkingin í oljuprísum í ár fara at gera, at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum vera munandi lægri, enn roknað varð við í fíggjarlógini. Partafelagsskatturin verður ávirkaður í 2021, tá ið feløg rinda skatt av avlopinum í 2020. Kapitalvinningsskatturin verður ávirkaður bæði í 2020 og 2021.

Roknast kann eisini við eykajáttanum seinni í ár orsakað av íkomnu støðuni við COVID-19, millum annað á heilsuøkinum og almannaøkinum.

Fyribils ber til at meta, at um ¼ av ávirkanini á úrslitið hjá landskassanum verður eykaútreiðslur orsakað av COVID-19 og at ¾ av ávirkanini verður lægri inntøkur orsakað av COVID-19.

Fíggjarmálaráðið metir kortini, at landið hevur fíggjarligt rásarúm til at taka á seg stór hall í nøkur ár og harav vaksandi skuld.

Ein avleiðing av íkomnu støðuni við COVID-19 verður ivaleyst, at rentuútreiðslurnar hjá landinum fara at hækka, men her skal viðmerkjast, at rentustøðið er framvegis sera lágt. Kostnaðurin av hægri rentuútreiðslum skal sammetast við kostnaðin fyri samfelagið av at fara gjøgnum eina stóra og drúgva afturgongd við hækkandi arbeiðsloysi og møguliga eisini fólkafráflyting.

Greitt er, at smá lond sum Føroyar, sum ikki hava egið gjaldoyra, hava neyvan somu møguleikar at taka á seg heilt nógva skuld í einum og eftir stuttari tíð, sum størri lond hava, uttan at hetta ávirkar kredittvirðið hjá landinum og uttan at rentan hækkar.

Fíggjarmálaráðið metir kortini, at føroyska almenna skuldin er somikið lág, at landið mest sannlíkt hevði kunnað fíggjað stór almenn hall í nøkur ár og økt skuldina samsvarandi og í stigum, uttan at hetta hevði ávirkað kredittvirði og rentu munandi. Hetta er kortini treytað av, at farið verður rætt og skynsamt fram, tá ið skuldin verður hækkað.

**Nøkur hugsað dømi ( V-,U-,L- ella W-støða)**
Hesi hugsaðu dømini um ymiskar støður næstu 1-2 árini verða nevnd í talvuni á næstu síðu:

*Skjótt niður, skjótt upp (V-støðan)*
Korona-smittan og fyribyrgjandi átøkini hava stóra ávirkan á búskapin, meðan tað í styttri tíð stendur uppá. Búskapurin kemur tó skjótt fyri seg aftaná og vinnur nakað av tí mistu framleiðsluni innaftur. Tað, sum talar fyri hesum, er, at føroyski búskapurin sum heild er væl fyri, bæði innan almenna og privata geiran.

*Miðal útfallið (U-støðan)*
Nakað verri enn V-støðan. Búskapurin kemur ikki eins væl og skjótt fyri seg sum í V-støðuni. Búskaparligi skelkurin hevur nakað longri varandi ávirkanir, sum viðførir hægri arbeiðsloysi og húsagangir, ið ávirka bæði nýtslu og íløgur.

*Versta útfallið (L ella W-støðan)*
Skelkurin hevur stóra ávirkan og viðførir ójavnvágir, sum taka tíð at rætta upp. Húsagangir og uppsagnir viðføra arbeiðsloysi, sum raka framleiðsluna og almennu inntøkurnar meint. Hendan støðan kann koma, um undantaksstøðan dregur langt út ella um búskapurin verður raktur av eini 2. smittubylgju. Danska búskaparráðið umrøður í síni greining 6. apríl møguleikan fyri eini aðru smittubylgju í heyst, sum aftur kann steðga búskapinum og trýsta almennu kassarnar enn meira. Hesin møguleiki er eisini til staðar í Føroyum.

Hendan støðan kann somuleiðis hugsast at hava við sær økta fráflyting, sum kann hava longri varandi ávirkan og trýsta haldførið í almenna búskapinum og búskapin sum heild.

**V-støða**

| | *2020* | *2021* |
|---|---|---|
| **BTÚ (broyting, fastir prísir)** | minkar 3-5% | hækkar 1-3% |
| **Úrslit hjá landskassanum** | 800-1.000 mió. kr. í halli | 300-500 mió. kr. í halli |
| **Landskassaskuld brutto** | um 23% av BTÚ | um 24% av BTÚ |

**U-støða**

| | *2020* | *2021* |
|---|---|---|
| **BTÚ (broyting, fastir prísir)** | minkar 5-7% | óbroytt BTÚ |
| **Úrslit hjá landskassanum** | 1.000-1.200 mió. kr. í halli | um ½ mia. kr. í halli |
| **Landskassaskuld brutto** | um 24% av BTÚ | um 27% av BTÚ |

**L- ella W-støða**

| | *2020* | *2021* |
|---|---|---|
| **BTÚ (broyting, fastir prísir)** | minkar 7-10% | minkar 1-2% |
| **Úrslit hjá landskassanum** | 1.200-1.500 mió. kr. í halli | 600-800 mió. kr. í halli |
| **Landskassaskuld brutto** | um 26% av BTÚ | um 30% av BTÚ |

**Niðurstøður**
Fíggjarmálaráðið ger vart við í sambandi við metingar av búskaparvøkstrinum og av úrslitinum hjá landskassanum í 2020 og 2021, at óvissan um tílíkar metingar er serstakliga stór, og metingarnar skulu skiljast við hesum í huga.

Fíggjarmálaráðið roknar samanumtikið við, at búskapurin kann minka 3-10% í 2020. Ber til at lata búskapin uppaftur eftir stuttari tíð og um gongd eisini kemur í heimsbúskapin eftir stuttari tíð, kann afturgongdin gerast um 5%. Verður hinvegin talan um eitt longri tíðarskeið á fleiri mánaðir ella longri, og um stór og drúgv afturgongd verður í heimsbúskapinum, kann búskapurin minka í minsta lagi um 10%.

Metingarnar hjá Fíggjarmálaráðnum samsvara við metingar hjá danska tjóðbankanum og OECD. Danski tjóðbankin roknar til dømis við, at danski búskapurin minkar 3-10% í 2020 og at stígur verður í búskapinum í 2021, áðrenn búskapargongdin verður meira vanlig aftur. OECD metir, at búskapirnir í Vesturheiminum minka um 2% fyri hvønn mánað, sum hørð tiltøk eru sett í verk fyri at seinka spjaðingini av COVID-19.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin kann fáa hall á í minsta lagi 800 mió. kr. í 2020 og møguliga nakað minni í 2021. Størsta orsøkin er, at inntøkurnar vera munandi minni sammett við, tá ið fíggjarlógin fyri 2020 varð gjørd. Vanligi landsskatturin verður helst lægri.

Minni innflutningur, minni umsetningur, og ógvusliga lækkingin í oljuprísum í ár fer at gera, at inntøkurnar frá meirvirðisgjaldinum vera munandi lægri, enn roknað var við í fíggjarlógini. Partafelagsskatturin verður ávirkaður í 2021, tá ið feløg rinda skatt av avlopinum í 2020. Kapitalvinningsskatturin verður ávirkaður bæði í 2020 og 2021.

Roknast kann eisini við eykajáttanum seinni í ár orsakað av íkomnu støðuni við COVID-19, millum annað á heilsuøkinum.

Fíggjarmálaráðið metir kortini, at landið hevur fíggjarligt rásarúm til at taka á seg stór hall í nøkur ár og harav vaksandi skuld.

Sæð í einum longri sikti hevur tað stóran týdning, hvussu føroyska samfelagið kemur burturúr aftur bráðfeingiskreppuni, sum kemur av ógvusligu avmarkingum í búskapinum, sum eru nú. Her hevur tað almenna, og serstakliga landið, ein stóran leiklut í at tryggja, at vinnulig arbeiðspláss eru til, tá samfelagið einaferð letur upp aftur. Tí lata okkara grannalond stórar hjálparpakkar, sum skulu avmarka missin í privata geiranum orsakað av COVID-19 og fyribyrgja, at samlaði eftirspurningurin minkar ov nógv. Higartil hevur Løgtingið samtykt hjálparpakka I og II frá landsstýrinum.

Samanumtikið er neyðugt, at landið frameftir, eins og gjørt er higartil, neyvt fylgir við gongdini í samfelagnum. Neyðugt verður at finna eina skilagóða javnvág millum heilsu- og búskaparatlit. Júst nú viga heilsuatlitini tyngri, men einki er at ivast í, at við tíðini mugu og fara búskaparligu atlitini at fáa størri tyngd.

Tinganes, 15. Apríl 2020

Fíggjarmálaráðið